# Fyrra brakið í Trongisvági

**Vinnur TB heimadystin á ÍF er av sonnum lagt upp til gulldyst, tá Mjølnir kemur á vitjan, hinvegin kann ÍF við einum sigri skapa sær bestu fortreytirnar**

KVINNUFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tríggir dystir eru á skránni í bestu kvinnudeildini í flogbólti. Og sum vera man, so er størsti spenningurin um, hvussu tað fer at tørvna út, tá TB og ÍF skulu takast. Seinast liðini hittust var í steypafinaluni, go møguliga kann dysturin gera, at TB nú fær sálarliga yvirtakið, sum ÍF annars tóktist at hava við trimum sigrinum í landskappingini.

Á heimavølli fær TB vanliga góðan stuðul frá áskoðarunum, og sum støðan er, so kann einki annað enn ein sigur brúkast, um FM-gullið skal endurvinnast.

Hjá ÍF nýtist eitt tap ikki at merkja eitt farvæl til FM-møguleikan. Í øllum førum ikki, um talan verður um fimm-settara. Eitt 3-1 ella 3-0 tap vil í øllum førum viðføra, at tær úr Fuglafirði mugu bíða eftir, hvussu úrslitini í hinum dystunum hjá TB laga seg, og tí er heldur einki at ivast í, at eisini tær fara eftir sigrinum.

Spennandi verður tað í øllum førum.



*ÍF hevur vunnið allar landskappingardystirnar ímóti TB í ár, men hinvegin vann TB steypafinaluna, so alt tykist opið undan toppdystinum á Kambsdali*

### Bara æran eftir

Hjá Drátti og Fleyr er bara æran eftir at spæla um. Hesi liðini hava einki at gera í stríðnum um gullið í deildini. Dráttur liggur soleiðis fyri, at metallið er rokið, og Fleyr hevur havt eitt kappingarár, ið best fer í gloymibókina ongantíð ov skjótt.

### Mjølnir kann fáa oddasessin

Hjá Mjølni skuldi uppgávan verið yvirkomulig hetta vikuskiftið. Eftir tapið fyri ÍF seinasta leikumfar reyk oddasessurin tvørtur um Leirvíksfjørð, men tað kann broytast, um so er, at TB hevur eins gott tak á ÍF sum í steypafinaluni og vinnur tann dystin. Endin á kappingarárinum hevur sjáldan verið so spennandi sum í ár.

# SÍ hongur í

**Sørvingar spæla framvegis fyri sínum møguleika. Vinna teir restina av sínum dystum, heldur spenningurin sær í øllum førum fram til seinasta leikdag**

MANSFLOGBÓLTUR
*FBF*

Sørvingar kunnu framvegis gerast føroyameistarar í meistaradeildini, og teir spæla fyri hesum møguleika. Mótstøðuliðið hesaferð er Fleyr, ið einki stig hevur fingið higartil, og tað skal undra almikið, um fyrstu stigini koma ímóti SÍ. Sørvingar eru sterkir, serliga á heimavølli og liðið er sera væl fyri júst nú.

Dysturin millum Mjølnir og Fram hevur ikki tann stóra týdningin, nú Mjølnir ikki kann vinna føroyameistaraskapin. Silvurið kann framvegis náast og tað er nú ikki so galið hóast alt, men dysturin verður óiva merktur at hesum. Hjá Fram hevur ikki ligið so væl fyri í seinastuni, men liðið hevur megnað at hótt Mjølnir í hinum dystunum, og kann ein góðan dag vinna á øllum.

# StÍF skal á beint

**Vinunr StÍF útidystin á Neistanum, er javnstøða í oddinum, har talan so fer at verða um kapprenning millum strandingarnar og vestmenningar**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tríggir dystir verða leiktir í bestu mansdeildini í hondbólti um vikuskiftið. Fyri oddastríðið er hin mest spennandi av hesum helst, tá StÍF vitjar hjá Neistanum. Hetta eru liðini, sum stóðu ovast á talvuni, tá grundspælið endaði, men í endaspælinum hava tey tó bæði havt trupulleikar av at fáa spælið at koyra nóg væl.

Ringast sær út hjá Neistanum, sum við greiða tapinum í Vestmanna seinasta vikuskifti mest sum meldaði seg úr oddastríðnum, og verður talan aftur um tap hesaferð, er talan mest sum um pass-meld.

Hóast spælið heldur ikki hevur koyrt nakað serligt hjá strandingunum, so hevur úrtøkan tó verið á eini leið. Seinasta vikuskifti var eisini líkt til, at nakað av flogið er komið yvir spælið aftur, og sigast má í øllum førum, at tað er í tøkum tíma. Strandingar eru nevnliga í løtuni tvey stig aftan fyri oddaliðið úr Vestmanna, sum hevur frí hetta vikuskiftið. Tí eru als ikki ráð at missa fleiri stig í oddastríðnum, sum nú av álvara tykist gerast ein tvídystur millum StÍF og VÍF. Men tað krevur altso, at strandingar nú finna taktirnar úr grundspælinum aftur.

### Bronsustríðið

Hinir báðir dystirnir verða í Hoyvíkarhølilni og í Runavík. Í Hoyvík vera tað tey bæði heimahoyarandi liðini, KÍF og H71, sum skulu takast. Fyri bæði hesi er galdandi, at tey við einum sigri av álvara kunnu leggja seg út í bronsustríðið. Serstakliga kollfirðingar hava fleiri í ár havt møguleika at leggja seg heilt fram í oddinum, men onkursvegna hava teir sýnt ótrúlig evni at tveita stig burtur seinastu løturnar í einstøku dystunum.

Var nakar í grundspælinum, sum tosaði um, at hoyvíkikngar skuldu leggja seg út í heiðursmerkjastríðið, so varð viðkomandi helst skýrdur sum óbøtandi optimistur, ellar í ringasta føri svakur, men tað er tó júst tað, sum er um at henda. Sigrar á eitt nú Neistanum og VÍF hava ført H71 langt burtur frá botnstøðuni, sum liðið var í undan endaspælið, og fáast tvey stig aftur hesaferð, fer av álvara at gerast spennandi hjá teimum.

Ein partur av orsøkini til framgongdina er uttan iva, at venjarin hjá liðnum, Uni Wardum, gjørdi av at finna harpiksið framaftur, men hann verður so ikki við hesaferð eftir reyða kortið, sum hann fekk í dystinum móti Tjaldri. Tí verður størsti spurningurin helst, hvussu hoyvíkingar nú fara at skipa álopspartinum, og um teir megna hetta nóg væl til tess at basa kollfirðingum.

Seinasti dysturin verður í Runavík, har Tjaldur fær vitjan av Kyndli. Seinastu dystirnar hevur Tjaldur verið fyri nøkrum sera teprum tapum, og einki er at ivast í, at teir vilja gera tað eina tonn betri, nú steypavinnararnir koma á vitjan. Júst heitið sum steypavinnarar siga tó nakað um, hvussu góðar dygdir Kyndils-liðið hevur, og verða hesar funnar fram í røttu løtunum, er ilt at síggja, hvussu runavíkingarnir skulu steðga teimum. Fyri Kyndil er eisini alneyðugt við tveimum stigum, nú bronsustríðið av álvara tykist at harðna, so tað verður neyvan so, at nakar parturin tekur ov lætt upp á uppgávuna sunnudagin.

## Dystir um vikuskiftið

### Hondbóltur

1. deild kvinnur

| | | |
|---|---|---|
| 02.03 | 14.30 | Neistin-StÍF |
| 02.03 | 15.30 | Stjørnan-VB |
| 02.03 | 14.30 | Tjaldur-Kyndil |

1. deild menn

| | | |
|---|---|---|
| 01.03 | 16.00 | KÍF-H71 |
| 02.03 | 16.00 | Neistin-StÍF |
| 02.03 | 16.00 | Tjaldur-Kyndil |

### Flogbóltur

Meistaradeild kvinnur

| | | |
|---|---|---|
| 01.03 | 13.00 | Fleyr-Dráttur |
| 02.03 | 13.00 | Mjølnir-KÍF |
| 02.03 | 15.00 | TB-ÍF |

Meistaradeild menn

| | | |
|---|---|---|
| 01.03 | 14.00 | SÍ-Fleyr |
| 02.03 | 15.00 | Mjølnir-Fram |




Tónleikatilboð

OVATION Guitarar

OVATION er guitarurin allir amerikumenn síggja upp til.
Nevnast kunnu millum annað Shania Twain, Toto, Pink, Pantera, The Scorpions, Megadeth, Alicia Keys, Bbmak, Starz, Cyndi Lauper, Melissa Etheridge og DJ Ashba (ársins guitarleikari California), ið nýta henda framúr góða guitar



Nú er OVATION komin til Føroya í stórum stíli, men til ein sera lítlan prís



OVATION CC01-Mahogany einans 5.950,-



OVATION CC026 einans 6.490,-
EQ og innbygdan stemmara



OVATION CS257 einans 9.890,-
EQ og innbygdan stemmara



OVATION CS255 einans 10.950,-
EQ og innbygdan stemmara
12 streingir

Sosialurin 311820

Send teldupost á: tonleik-elding@post.olivant.fo
og ver við í lutakastinum um gávukort á kr. 1.000,-

Ein betri loysn!
ELDING
SMS – Tel. 319697 · Saltangará – Tel. 449697 · Klaksvík – Tel. 479697



Prísur

Travel Card




Prísur á Travel Card hjá Strandfaraskipum Landsins er frá 1. mars 2003 broyttur til

4 dagar kr. 600 | 7 dagar kr. 900

STRANDFARASKIP LANDSINS

www.ssl.fo · 34 30 30

REPROZ



TK Stovan

## Kunningarfundur um broytingarfúsa leiðslu

**Dagur: 6. mars 2003**
**Hósdag kl. 14.00-17.00 á Hotel Føroyum**

**Skrá**

**14.00 Kunning um broytingarfúsa leiðslu**
- Avbjóðingar í broytingum
- Mynstur í broytingum
- Brennandi pallur
- Hugsjónin fyri broytingina

**15.00 Kaffisteðgur**

**15.30 Broytingarfús leiðsla – framhald**
- Meginreglan í dupultum bókhaldshátti
- Persónlig atburðarmynstur
- Kjak og prát

**17.00 Liðugt**

### Broytingarfús leiðsla

**Øll vilja hava broyting, men eingin vil broyta seg...**
Allar broytingar byrja við, at einstaklingar og virkir eru til reiðar at fara ígjøgnum broytingina og tískil eisini eru til reiðar at bera seg øðrvísið at enn áður.

**Kunningarfundurin snýr seg um:**
- Hví er tað so torført at fremja broytingar?
- Hvussu verður broytingarfús leiðsla ítøkilig og skiljandi?
- Hvørjar vanligar orsøkir eru til mótstøðu ímóti broytingum?
- Hvussu lofta vit og beina burtur mótstøðu ímóti broytingum?
- Hvussu ber til at skilja og arbeiða við persónligum atburðarmynstrum í eini broytingartilgongd?
- Hvørjar hættur og ítøkilig amboð finnast, ið kunnu nýtast í broytingartilgongdini?

Við at luttaka á fundinum kannst tú læra meira um, hvussu tú léttari kann fremja broytingar í verki.

**Kostnaður:** kr. 600 u/mvg

**Tilmelding:** TK Stovan, faks nr. **31 93 63**, tel. **31 73 66** ella **teldupostur tk@tk.fo** - Tilmeldingarfreist í seinasta lagið mikudagin **5. mars 2003 kl. 16.00.**

Virkisnavn: ____________ Tal á luttakarum: ____________

Navn/nøvn: ____________

Tel.: ____________ Faks: ____________

**TK Stovan**
Niels Finsens gøta 37, FO-100 Tórshavn
**Tel** +298 317366, **Faks** +298 319363
tk@tk.fo
www.tk.fo

**VILJI VITAN VØKSTUR**

TK Stovan er ein liður í menningini av føroyska vinnulívinum og samstundis ein partur av tí umfevnandi danska TIC-kunningarsamstarvinum.

SANSIR 355 355


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr.** P/F 911, P/F Sandá, 497 Selatrað.

**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Egil Mittún Petersen, 497 Selatrað.
**Innkomin í nevndina:** Meinhard Jacobsen, Traðarbrekka 4, 100 Tórshavn og Gunnar Mohr, J. C. Svaboesgøta 29, 100 Tórshavn.

*Skráseting Føroya tann 27. februar 2003*

*Kristin Balle*


AUTO
-Dag & nátt-
Vilt tú bil hýra - ring 311234
-Alt døgnið-
Nú fáast eisini Talutíðarkkort
BENZIN DIESEL KIOSK
Føroya Tele Kall



AUTO
311234